# Altjóða oljufólk á ráðstevnu í Havn

**Týsdagin og mikudagin verður stór altjóða oljuráðstevna hildin í Norðurlandahúsinum við luttøku av umleið 160 fólkum. Talan er um granskarar og serfrøðingar innan oljuleiting og her serstakliga innan jarðfrøði og jarðalisfrøði. Endamálið er at skapa eitt forum fyri fólki, sum arbveiða við oljuleiting á Føroyaøkinum**

RÁÐSTEVNA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



*Stór oljuráðstevna í Havn setir fokus á oljuleiting við Føroyar. Heri Ziska er ein av oddamonnunum aftanfyri stevnuna*

Í mai 2004 skipaði Jarðfeingi (tá: Jarðfrøðisavnið) fyri tí fyrstu Faroe Islands Exploration Conference (FIEC). Hetta eydnaðist sambart heimasíðuni hjá Jarðfeingi so væl, at Jarðfeingi hevur gjørt av at skipa fyri hesari ráðstevnu annað hvørt ár. Í ár verður ráðstevnan hildin í Norðurlandahúsinum í døgunum 11. til 13. september.

Faroe Islands Exploration Conference er ein teknisk ráðstevna, har vísindafólk greiða frá sínum granskingarúrslitum, ið eru viðkomandi fyri kolvetnisleiting á føroyska landgrunninum, fyri javnlíkum. Á seinastu ráðstevnu vóru tað umboð fyri oljuumsitingar, granskingarstovnar og oljufeløg, sum løgdu fram.

Komandi ráðstevna er nakað víðkað, soleiðis at hon nú byrjar mánadag (11. september) við einum sokallaðum “field trip”, har Jarðfeingi skipar fyri einum túri, hvørs endamál er at hyggja eftir føroysku jarðfrøðini. Aftaná field trip verður ein móttøka (Icebreaker) á Føroya Náttúrugripasavni.

Týsdagin byrjar sjálv ráðstevnan við fyrilestrum allan dagin. Um kvøldið verður skipað fyri einum “students evening”, har roynt verður at skapa samband millum føroysk jarðfrøðislesandi og møguligar arbeiðsgevarar.

Mikudagin heldur ráðstevnan áfram við fyrilestrum, og um kvøldið verður almenni ráðstevnudøgurðin á Hotel Føroyum.

Í sambandi við komandi ráðstevnuna er avtala gjørd við HYPERLINK ”http://www.sindri.fo/”Sindri um, at Sindri skipar fyri eini ráðstevnu 14. september, sum er dagin eftir FIEC06. Endamálið við hesum degnum er, at tey, ið hava fingið granskingarverkætlanir stuðlaðar gjøgnum Sindri, leggja fram síni úrslit fyri almenninginum. Jarðfeingi skipar fyri Sindri-ráðstevnuni vegna Sindri.

Ráðstevnan hevur egna HYPERLINK ”http://fiec.jf.fo/Default.htm”heimasíðu við nærri upplýsingum um skrá, tilmelding og tiltøk annars.

Ráðstevnan í ár fer at seta fokus á oljuleiting við Føroyar. Í hesum sambandi kann nevnast, at fyrilestrar vera um tær báðar boriverkætlaninar, sum verða í 2007 og 2008, nevniliga Williambrunnin og Anne Marie brunnin. Eisini verður greitt frá Rosebankverkætlanini, har tað skulu borast tríggir avmarkingarbrunnar í næstum. Nógvir fyrilestrar eru um jarðfrøðilig viðurskifti og tær kanningar, sum bæði oljufólk og serkøn við lærdar háskúlar hava arbeitt við.

Talan er av sonnum um eitt sera gott avrik hjá Jarðfeingi, tí tað er ikki á hvørjum degi, at til ber at savna so mong professionell folk á hesum øki til eina ráðstevnu í Føroyum og sum entá hevur Føroyar sum focus.



*Norrøna heilsar Stena Don, sum borar á landgrunninum*
*Mynd Árni C*

## *Løgreglutíðindi:*

## Fullur maður leyp á sjógv

**Tíðliga sunnumorgunin leyp ein maður á sjógv á Skálatrøð. Løgreglustøðin fekk fráboðan um hendingina, og teir megnaðu at bjarga manninum, sum var sera ávirkaður.**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um 4-5 tíðina sunnumorgunin fekk løgreglustøðin í Havn fráboðan um, at ein maður ætlaði at leypa á sjógv niðri á Skálatrøð. Maðurin hevði sagt við eina konu, sum hann fylgdist við, at hann ætlaði at leypa á sjógv, so konan ringdi beinleiðis á løgreglustøðina. Ein bilur bleiv sendur oman, og eftir eina løtu funnu teir ein bunka av klæðum liggjandi á vegnum.

Teir fóru so at leita eftir manninum og funnu hann liggjandi á sjónum niðri við Skálatrøð. Løgreglan fekk hálað mannin uppá land, og skjótt var greitt, at maðurin eftir umstøðunum hevði tað gott. Hann var sera ávirkaður, kaldur og illa fyri. Hann bleiv fluttur beinleiðis á landssjúkrahúsið til viðgerðar.

## Rendu á við stolnum bili

**Tveir gamlir kenningar hjá løgregluni í Klaksvík koma at frætta nærri frá bæði fúta og løgreglu, eftir at teir gjørdu um seg tíðliga sunnumorgunin.**

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Klokkan var knapt níggju sunnumorgunin, tá ið løgreglan í Klaksvík fekk boð um eitt ferðsluóhapp á Víkavegi.

Tveir mans komu koyrandi í bili. So hendi tað, sum ikki skuldi henda. Teir rendu á. Eftir óhappið hildu teir báðir til beins og rýmdu. Teir blivu tó sæddir, og síðani hevur løgreglan tikið báðar menninar. Hesir eru báðir gamlir kenningar, sum løgreglan hevur nógvar síður um. Tað vísti seg eisini, at bilurin, teir koyrdu í, var stolin.

Teir rendu á ein parkeraðan bil á Víkavegnum. Hesin bilur bleiv aftur skumpaður í ein triðja bil, so tilsamans tríggir bilar fingu skaða. Talan er um umfatandi skaða, sigur løgreglan í Klaksvík.

Maðurin, sum var ferðamaður hevði koyrikort, men tað hevði førarin ikki. Men teir høvdu í hvussu so er báðir kenning og blóðroynd er tikin av teimum.



*Soleiðis síggja teir báðir bilarnir út, sum sunnudagin vórðu árendir av einum druknum bilførara í stolnum bili*

## Stevna við altjóða dámi

Í vikuskiftinum var stór útimissiónsstevna í Nesvík. Nógv var gjørt burturúr, og nógvar føroyskir trúboðarar fingu høvi at greiða frá teirra upplivingum. Á myndini eru tað Jórun og Nurlan Malaikiev, sum saman við soninum og foreldrunum hjá Jórun eta døgurða á forkunnugan hátt. Jórun og Nurlan eru trúboðarar, og tey arbeiða millum gøtubørn í Kiev, Ukraina. Les meira um útimissiónsstevnuna í Sosialinum í morgin.

**- HeiniK**

